## DAGSINS MEINING

# NM í Føroyum – eitt gott hugskot

Í vikuni høvdu vit her í blaðnum áhugaverda samrøðu við aðalskrivaran í Fótbóltsambandinum, har upplýst varð, at Føroyum stendur í boði at gerast vertur fyri NM-kappingina í august í ár fyri U-17 landslið. FSF hevur havt tilboðið eina tíð og hevur FSF dúgliga arbeitt við málinum. Málið er enn ikki endaliga avgjørt og er tilboðið framvegis til umhugsingar hjá FSF.

Føroyskur fótbóltur hevur sum kunnugt tikið seg heilt væl fram seinastu árini. Avrikini hava verið stór og hava vakt undran og virðing í altjóða fótbóltsumhvørvinum. Tað er tí av størsta týdningi fyri menningina av føroyskum fótbólti, at áhugin í Føroyum verður stimbraður og styrktur. Annað, sum hevur týdning, er at tryggja tilgongd av dugnaligum leikarum. Í hesum sambandi er sera umráðandi at menna áhugan og førleikarnar hjá ungu leikarunum. Eisini er tað av týdningi fyri rekrutteringina av nýggjum ungum leikarum, at týðandi fótbóltshendingar fara fram í Føroyum. Tað er tí eingin ivi um, at vit øll ynskja og vóna, at tað fer at eydnast FSF at fáa NM-kappingina fyri U-17 landslið til Føroyar, og eiga allar góðar kreftir at virka fyri hesum.

FSF hevur áður skipað fyri slíkari kapping í Føroyum. Tað var nevniliga fyri sjey árum síðan, og hetta var ein stórhending, ið økti munandi um fótbóltsáhugan millum ungdómin. Skal føroyskur fótbóltur framvegis verða við í altjóða kappingum og samstundis mennast enn meira, er sjálvsagt neyðugt støðugt at hækka førleikastøðið hjá leikarunum og samstundis er tað av størsta týdningi at tryggja tilgongdina av nýggjum ungum og yngri leikarum. NM-kappingin fyri U-17 landslið fer uttan iva at økja munandi um áhugan millum børn og ung fyri góðum fótbólti. Hetta hevur stóran týdning. Men tað hevur ikki minni týdning, at føroyskir áskoðarar fáa høvi at síggja nakrar spennandi og undirhaldandi fótbóltsdystir. Afturat hesum kemur so týdningurin av tí positivu umrøðu, ið okkara land far í útlendskari pressuni í samband við, at ein slík kapping verður hildin í Føroyum. Alt hetta virkar til tað góða fyri okkum, sum her búleikast.

Sum tað skilst á aðalskrivaranum hjá FSF eru nakrir praktiskir trupulleikar í sambandi við at skipa fyri NM-kappingini fyri U-17 landslið í Føroyum. Vit munnu verða mong sum vóna, at tað skal eydnast FSF at vinna á hesum trupulleikum, so hetta frálíka tilboð ikki gleppur okkum av hondum. Vit ivast ikki í, at FSF, sum er ein vælskipaður og sterkur felagsskapur, fer at megna hesa uppgávu og fara vit at ynskja FSF góða eydnu við hesi uppgávu.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# SVF spælt totalt falitt

**Jón Tyril**



Eftir drúgt kjak um fjølmiðlasið og ábyrgdina hjá fjølmiðlum osfr. í kjalarvørrinum av bókini "skjót journalistin" sær tað út til at støðið fyri føroyskar fjølmiðlar, ella rættari Sjónvarp Føroya, er lægri enn nakrantíð.

Eitt er, at kjakið verður drigið niður á petitessur og detaljur, og tey stóru málini verða kámað burtur, at alt verður stýrt við stoppuri, og at fremsta uppgáva vertsins sær út til at vera at ørkymla tey frammøttu valevnini mest møguligt og gera tey ótrygg. Men tað sum undrar meg mest við øllum er, at tann mest politiskt løddi journalisturin í Føroyum í løtuni, Øssur Winthereig – annar av høvundunum til bókina, sum beinleiðis var orsøkin til at samgongan slitnaði og at vit fingu eitt nýval – er settur at stýra tí kanska týdningarmesta partinum av valstríðnum, nevniliga sjónvarpskjakinum. At leiðslan í SvF ikki sær vandan í hesum er himmalrópandi kritikkleyst. SVF hevur gjørt óhepnasta valið, sum yvirhøvur var møguligt, tá teir valdu vertin til politiska kjakið.Eftir at hava sæð undanfarnu sendingar eri eg farin at seta mær sjálvum spurningin: Hvørja dagsskrá hevur Øssur, ella møguliga SvF? Er tað stutthugsan ella er tað tilætlað? Sær SvF ongan trupulleika við at hava júst hendan journalistin at stýra júst hesum kjakinum? Eg haldi hesir spurningar krevja svar. (Øssur hevur sum so ongan lut í ónøgdini, tað er SvF, sum hevur sett hann).

# Fólkaflokkurin og persónsdyrkan!

**Dia Ellindsson**
*Runavík*

Vit hava bæði hoyrt og lisið um persónsdyrkan og aðra skurðgudadyrkan. Men hetta fyrifórst áðrenn okkara tíðarrokning. So hetta skuldi verið ein farin tíð.

Men tíverri sæst í bæði sól og mána, at hetta er við at kykna uppaftur í okkara pinkulandi Føroyar.

Hin Føroyski Fólkaflokkurin er nú glaðbeintur farin út í hesa fornu skurðgudadyrkan.

Hetta sæst best við at teir hálova persónin Anfinn Kallsberg út um øll møgulig mørk. Ja, enntá Óli Breckmann er vorðin ein kolasvartur skuggi afturímóti. Hin stóri spurningurin er fyri mong fólk: Trýr fólkaflokkurin meira á Anfinn Kallsberg, heldur enn Várharra Jesus Kristus, tað átti at verið munur á monnum.

Ein anti skurðdyrkari.

# Anna Mohr listaframsýning í Leikalund

**Í januar mánaði hevur Anna Mohr úr Klaksvík listaframsýning í Leikalund**

TÍÐINDASKRIV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Anna Mohr er ung listarkvinna. Hon er 25 ára gomul, men hevur longu í fleiri ár roynt seg við málningalist og víst seg at verða vælumtókt.

Við á framsýningini eru umleið 15 nýggir akryl málningar, har myndaevni er landslagsmyndir meira og minni abstraktar.

Framsýningin letur upp fríggjadagin 9. januar klokkan 16.00, har øll eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið, síggja framsýningina og fáa ein kaffimunn. Myndirnar eru til sølu og eru at síggja í vanligari upplatingartíð frá mánadag til fríggjadag frá 10 til 17:30 og leygardag frá 10 til 13. Framsýningin verður hangandi allan januar mánaða.

Framsýningin, ið tekur við aftaná Onnu, verður við myndum hjá Livar Nysted. Hann sýnir fram í Leikalund í februar mánaði.




**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Dimmalætting og etikkur

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
*Poul Mohr*



Í grein í Dimmalætting frá 6. januar 2004 verður ført fram, at monopol á føroyska skipasmiðjumarknaðinum er orsøk til at undirveitarar til hesa vinnu eru í svárari kreppu. Somuleiðis verða førd fram sjónarmið frá Jónsvein Knudsen, reiðara í Runavík.

Greinin er ógvuliga lítið undirbygd, einki kanningararbeiði er gjørt av støðuni hjá skipasmiðjuídnaðinum sum heild. Byrjað verður við niðurstøðuni, at Skipasmiðjan hevur ábyrgdina av støðuni, og so skrivað harfrá. Skipasmiðjan fekk ikki høvið at gera viðmerkingar til greinina, áðrenn hon fór í blaðið, og sendu vit tí í gjár (6/1-04) okkara viðmerkingar til greinina til blaðmannin, Uni L. Hansen.

Í okkara viðmerkingum verður greitt frá vánaligu støðuni hjá Skipasmiðjuídnaðinum sum heild í londunum uttanum okkum, og hvørja ávirkan hetta hevur havt á kappingarstøðuna hjá føroysku skipasmiðjunum og undirveitarum. Eisini verður greitt frá møguligum orsøkum til minkandi virksemi á føroysku skipasmiðjunum. Greitt verður eisini frá, at hóast Skipasmiðjan manggan er kappingfør í prísi og dygd, fara fleiri skip uttanlands við arbeiðinum uttan so mikið sum at spyrja um prís í Føroyum.

At enda í viðmerkingum okkara taka vit lutvíst í egnan barm og siga, at Skipasmiðjan kanska ikki hevur verið nóg góð at umstilla seg til nýggju siðvenjuna í skipavinnuni, kanska serliga tá um kundavitjan ræður.

Viðmerkingar okkara vórðu sendar blaðmanninum fyrrapartin í gjár, og væntaðu vit tí at hesar fóru at koma við í blaðið í dag. Nú blaðið er útkomið, hevur blaðmaðurin valt at skriva eina forsíðugrein, har einans 5 reglur úr viðmerkingum okkara verða umrøddar. Restin av greinini er endurtøka frá degnum fyri. Høvuðstrupulleikin hjá vinnuni, og orsøkirnar til hetta, verður als ikki umrøddur, helst tí hann ikki tænir »sakini« hjá blaðmanninum og blaðnum. Blaðmaðurin endurgevur orðarætt brot úr viðmerkingunum og vísir annars til tær í greinini. At blaðmaðurin soleiðis brúkar viðmerkingarnar, sum honum lystir, er væl hvat væntast kann, men hinvegin høvdu vit so væntað, at fulla skrivið frá Skipasmiðjuni fekk innivist í blaðnum, nú víst varð til tað, soleiðis at fólk, sum vóru áhuga í øðrum enn »yvirskriftini« fingu høvi at lesa hetta, men nei! Tað kundi kanska hent, at nakrir lesarar ikki høvdu somu fatan av støðuni, um skrivið var í blaðnum, men at taka nøkur fá brot úr skrivinum og so gloyma restina er í fínasta ordan, sambært Dimmalætting.

Eftir stendur Skipasmiðjan, sum dagliga breyðføðir millum 200-250 fólkum og familjum teirra og spyrja: Hvat er endamálið? Hví skulu vit ómaka okkum við at gera viðmerkingar til blaðið, tá tær allíkavæl verða misnýttar?

Fyri okkum at síggja er hetta manipulatión og pressumisnýtsla av grovasta slag og at seta demokratisku spælireglurnar til viks. Harafturat er hetta at halda fólki fyri tað turra spott, men sjálvandi, tað selur helst nøkur bløð eyka......

Ei undur í, at føroyingar hava so lítið álit á føroysku fjølmiðlunum, tá hetta er støðið.

# Viðmerking til grein í Dimmalætting 6. januar 2004 um Skipasmiðjuna



Í omanfyri nevndu grein verður ført fram, at undirveitarar hjá Tórshavnar Skipasmiðju eru illa sperdir orsaka av væntandi kappingarføri hjá Skipasmiðjuni. Hetta er ein pástandur, sum ikki kann fara aftur við borðinum ósvaraður.

Líka so væl sum undirveitararnir hjá Skipasmiðjuni nú eru illa sperdir av minni virksemi, hava hesir liva væl av nógva virkseminum, sum hevur verið á Skipasmiðjuni. Lat tað verða sagt beinanvegin, at Skipasmiðjan eisini merkir, at væl minni er at gera í vinnuni, serliga seinasta árið. Orsøkirnar til hetta eru helst fleiri, t.d.:

- Føroyski flotin er minkaður seinastu árini
- Nógv skip eru umbygd og høvuðsumvæld seinnu árini, og krevja tískil minni viðlíkahald
- Fleiri reiðarí gera einans tær mest átroðkandi umvælingar, nú útlitini ikki eru so góð
- Reiðaríini spyrja um tilboð úr fleiri londum, tá arbeiði skulu gerast
- Fleiri dømi eru um skip, sum fara uttanlands til umvælingar uttan at biðja um tilboð í Føroyum

Skipasmiðjuni kunnugt fara skipini uttanlands m.a. av tí at arbeiðið sigst vera bíligari, betur umstøður eru at mála og sandblása og ofta sigst tíðin eisini vera styttri. Í flestu førum er Skipasmiðjan tó kappingarfør í prísi og dygd, men ásannandi at lønarlagið í Føroyum er hækkað 30-40% seinastu 4 árini, gerst hetta alt truplari. Í ávísum førum kann munandi størri arbeiðsorkan hjá útlendsku skipasmiðjunum og teirra ørgrynnu av undirveitarum stytta um umvælingartíðina uttanlands.

Viðgangast má, at umstøðurnar til sandblásing í Føroyum kundu verið betri, og gjørdi Skipasmiðjan tí í 2001 stóra íløgu á Skála í sonevnda hydroblásing, ið kann sammetast við sandblásing; er tó ikki heilt so gott, men munandi meiri umhvørvisvinarligt. Henda skipan hevur riggað væl.

Skipasmiðjuídnaðurin í grannalondum okkara er í svárari kreppu, og hevur hetta havt við sær, at tær skipasmiðjur, sum enn eru, kappast sera hart um kundarnar. Tí er tað ikki rætt, tá ført verður fram, at Skipasmiðjan hevur monopol. Tá Tórshavnar Skipasmiðja keypti Skipasmiðjuna á Skála eftir húsagangin í 1997, var endamálið als ikki at fáa monopol, men heldur at gerast før fyri at veita fleri kundum eina enn betri tænastu, nú skipini gjørdust alt størri. Fyri at standa seg betri í altjóða kappingini er vanligt í dag, at eindirnar (eisini skipasmiðjurnar) gerast færri og størri.

Skipasmiðjan tekur fult undir við sjónarmiðnum um vandan í, at ov nógv arbeiði fer av landinum og harvið hóttir førleikan í at menna, viðlíkahalda og endurnýggja skipaflotan, sum vit øll í síðsta enda skulu liva av. Tí er umráðandi at partarnir í vinnuni samstarva til tess at steðga hesi skeivu gongd.

P/F Tórshavnar Skipasmiðja hevur 67 ár á baki, og hevur gjøgnum øll árini havt gott samstarv bæði persónliga og fakliga við reiðarí og undirveitarar, sum eru komin her. Tíðirnar broytast, nýggir menn koma til og nýggjar mannagongdir, og Skipasmiðjan hevur helst ikki duga nóg væl at tikið við broyttu siðvenjuni, herundir at vitja kundarnar oftari.

Viðvíkjandi útsøgnunum hjá Jónsveini, standa hesar fyri hansara egnu rokning. Skipasmiðjan viðger ikki síni viðskiftafólk í fjølmiðlunum. Annars skal ikki standa á at koma aftur at vitja Jónsvein í nýggja húsinum.

*Tórshavn á Trettanda 2004.*

**Poul Mohr**
**Gunnar Mohr**